## DAGSINS MEINING

# Politiserandi embætismenn

Tað skerst ikki burtur, at vit í hesum valskeiðnum hava verið vitni til politiserandi embætismenn. Hetta eru vónandi eindømi ella bert eitt fátal, men eingin grund er at dylja fyri, at slíkt er komið fyri.

Í Hvítubókararbeiðnum luttóku ivalyst nógvar góðar kreftir, og kom ymiskt áhugavert fram. Fólk hava gjørt vart við, at sera lítið var gjørt við loysnir millum heimastýri og fullveldi innanfyri danska grundlóg, og at menn vóru ov bráir at avskriva henda møguleika. Eisini manglaði búskaparparturin eina greiða niðurstøðu, helst tí, at mongu búskaparfrøðingarnir høvdu ringt við at semjast.

At Búskapar- og Løgfrøðingafelagið nú trínir á pallin at verja leiklutin hjá embætisfólki generelt er alla æru vert, tí politiserandi embætismenn hoyra ivaleyst bert til undantøkini, men at teir als ikki skulu finnast er veruleikaflukt. Hvar var Búskapar og Løgfrøðingafelagið, tá Høgni Hoydal almannakunngjørdi fyri øllum Føroya fólki, hvat ein einstakur embætismaður skuldi hava í krónum og oyrum fyri at leggja fram fyri at sáa iva um útsøgnini hjá sama manni? Hesin embætismaður, ið sjálvur hevði skrivað partar av Hvítubók, hevði dittað sær at kritiserað mátan, ið búskaparparturin í Hvítubók bleiv framlagdur uppá. Tá var tøgn frá búskapar- og løgfrøðingafelagnum.

Eitt bræv varð sent til ST undirskrivað av einum embætismanni. Um so er, at hesin embætismaðurin, hvat er lítið hugsandi, gjørdi hetta av sínum eintingum, so eigur tað at fáa fylgjur. Um hann bleiv beinleiðis beordraður til at senda hetta bræv, so átti hann at gjørt avvarandi landstýrismanni greitt, at samskifti við ST formelt gongur gjøgnum danska uttanríkismálaráðið so leingi vit eru undir Heimastýrislógini. Um ein landstýrismaður sjálvur vil senda eitt slíkt bræv, so er tað pínligt, at ein embætismaður ger tað, er haraftur-ímóti sera álvarsligt. Spurningurin er so eisini um, hvat politiskt trýst er lagt á embætismannin.

Eitt annað dømi um, at markið millum embætisverk og partapolitikk er útviskað er fullveldisheimasíðan hjá Landstýrinum. Tá einki navn stendur undir, má man ganga útfrá, at umsitingin stendur aftanfyri hesum sonevnda “kunningartilfari”. Lat okkum hyggja at niðanfyristandandi dømi frá hesari heimasíðu, har embætisfólk hava svarað borgarum:

“Eru vit IKKI ein serstøk tjóð men bert ein flokkur av dønum, soleiðis sum danska stjórnin heldur uppá, so hava vit ongi rættindi yvirhøvur. So er hetta bert eitt innlendis danskt mál, og danska stjórnin kann gera júst sum hon vil” Eina aðra staðni stendur um avtalubrot: “Higartil hevur danska stjórnin noktað at fylgt hesi avtalu, og ikki viljað samráðst um spurningin”

Eru hetta fakligar vurderingar? Var tað arbeiðið hjá einum fakmanni, ið fór til ST, ella var tað ein politisk manifestatión við einari embætisundirskrivt undir?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Barnaverndirnar - orðaskifti, ið hvarv

**Eyðólv Dimon**



Síðan kommunurnar á fyrsta sinni vórðu skipaðar í 1872, er samfelagið broytt nógv, og samstundis hevur tíðarhóskandi lóggáva ikki fylgt við. Úrslitið er, at nógvar góðar skipanir eru blivnar stirvnar, samstundis sum tær eru sera ójavnar fyri borgaran, alt eftir hvar í landinum hann býr. Nú er tíðin komin, har vit fáa eina tíðarhóskandi kommunuskipan. Eina skipan, sum styrkir fólkaræðið, og tá er neyðugt, at avgerðarrætturin liggur so nær borgaranum, sum til ber.

**Øll kenna hvør annan**

At limir í barnaverndunum eftir førimuni gera eitt gott arbeiði, skal ongin ivi vera um. Men samfelagið er lítið við teimum fyrimunum og vansum, ið hetta hevur við sær. Øll vita alt um hvør annan, og tað skuldi veri ein fyrimunur eitt lítið samfelag hevur í mun til eitt størri samfelag. Men samstundis sum tað er ein fyrimunur, at vit øll kenna hvønn annan, so kann hetta eisini vera ein trupulleiki.

**Landið, kommunan og økið**

Tíðin hevur víst, at ávís mál verða betri røkt í hóskandi størri eindum, og tí byggir uppskotið hjá Javnaðarflokkinum til nýggja kommunuskipan á eina trídeilda skipan: Kommunan, landið og økið. Eitt økisráð, sum verður valt við beinleiðis valið, samstundis sum val er til kommunustýrið, skal røkja ávís mál í økinum. Barnaverndirnar skulu so í framtíðini liggja hjá økisráðnum, og at tryggja fíggjarliga partin til hetta arbeiðið, skal løgtingið taka sær av.

**Neyðugt við sakkunnleika**

Hetta fer at gera tað lættari at manna barnaverndirnar, tí fólkagrundarlagið er størri. Samstundis ger broytingin, at møguligt er at neyðugur sakkunnleiki, t.v.s. Heilsusystrar, sosialráðgevarar, petagogar o.s. fr. eru við í arbeiðinum hjá barnaverndunum. Sakkunnleikin er betri skikkaður at síggja og geva røttu hjálpina, har tørvur er á tí. Tí má orðaskifti ikki fara av kós og enda við at snúgva seg um, skulu vit í framtíðini hava barnaverndir ella sakkunnleika. Hetta var tað ein fekk ferilin av í Breddanum í SVF.

**Børnini gjalda prísin**

Familjumynstrið er nógv broytt, og broytingarnar hava ikki altíð verið til fyrimuns hjá børnunum. Dreymurin um tíð saman við foreldrunum, tryggleiki í uppvøkstrinum og menningarmøguleikar í einum samfelag, sum er innrættað til børn og fyri børn tykist fjarari hjá teimum flestu. Hetta hóast vit vita, at góðar umstøður hjá barnafamiljunum er ein íløga fyri, at vit øll skulu fáa eitt betri samfelag. Prísin fyri hesa skeivu gongd gjalda børnini, sum eru tey veikastu í eini familju.

**Sosialið arvurin brótast**

Tí skulu børn, sum verða útsett fyri umsorgarsvíki ella hava ein uppvøkstur undir sosialt belastaðum korum, hava hjálp, og um málið er, at vit skulu hjálpa ”øllum”, tá er neyðugt, at sakkunnleikin er við í arbeiðinum, tí annars verða tað ov nógv, sum ikki fáa hjálp av eini ella aðrari orsøk. Nógv verður tosað í grannalondunum um tann ”sosiala arvin”. Hesin má koma í brennidepilin her heima eisini, tí tað er av al stórum týdningi, at ”sosiali arvurin” verður brotin so tíðliga sum gjørligt. Her er neyðugt, at m.a. heilsu- og skúlasystraskipanin verður enn betri, so hon gerst ein sentralur partur í fyribyrgjandi arbeiðinum.

# Mangir bústaðir

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



”Ein greiður íbúðarpolitikkur verður raðfestur. Alternativir íbúðarmøguleikar skulu skapast kring landið í samstarvi millum landið og kommunurnar, bæði sum kommunalar/privatar leiguíbúðir, lutafelagsíbúðir, eldraíbúðir, íbúðir til rørslu- og menningartarnað, ungdómsíbúðir o. a.” Hesi orðini eigur brátt farna samgongan. Knapt fýra ár seinni er onki hent. Onki!

Vit hava ikki fingið nakran íbúðarpolitikk, tíðansheldur nakran greiðan ella raðfestan íbúðarpolitikk. Samgongan við fólki sum Finni Helmsdal, Annitu á Fríðriksmørk, Bjarna Djurholm og Helenu Dam á Neystabø á odda, hevur ikki skapt íbúðarmøguleikar, enn minni alternativar íbúðarmøguleikar, og slettis ikki í samstarvi millum land og kommunur.

Heppikórið hjá Høgna Hoydal slapp ikki upp í part, tá politikkurin skuldi orðast, og tey sluppu heldur ikki at arbeiða við teimum evnum, sum vóru for jarðbundin til Høgna.

Í Tórshavnar kommunu hava vit orðað ein greiðan eldrapolitikk. Hetta er, hóast at eldraøkið er landsmál. Vit varða av teimum mongu, bæði eldri og øðrum, sum ikki fáa íbúðarmøguleikar. Men vegna uppgávubýtið, skattabýtið og ikki minst tær ólógligu íløgukvoturnar, sum fíggjarmálaráðharrin áleggur okkum, fáa vit í kommununi onki gjørt.

Landspolitikkur er ikki bara at loysa landið frá øðrum londum. Landspolitikkur er at loysa landsins trupulleikar. Samgongan náddi ikki sínum høvuðsmálum, men ikki tí tey ikki royndu. Innan eldra-og íbúðarøkið royndu tey ikki ein gang.

Okkum tørvar enn ein greiðan og raðfestan íbúðarpolitikk.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Kunning um uppskotini til brúkarapolitikk

**- ein brúkaravegleiðing, so tú kanst gera tínar egnu metingar**

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Uppskotini hjá Javnaðarflokkinum til brúkarapolitikk eru umrødd í fjølmiðlunum. Og tey hava verið til fyrstu viðgerð í løgtinginum. Sum kunnugt eru ymisk sjónarmið um tørvin á hesum brúkarapolitisku framtøkunum.

Her er ætlanin at siga lesaranum frá, hvussu tú kanst gera tínar egnu metingar, við at seta teg inn í ta lættlesiliga álitið ella frágreiðingina, sum Javnaðarflokkurin hevur gjørt um tørvin á einum veruligum brúkarapolitikki í Føroyum. Og samstundis kunna teg um lógaruppskotini um Marknaðarføring, Brúkarakærunevnd og Brúkaraumboð.

- Far inn á heimasíðuna hjá Javnaðarflokkinum:
- www.javnadarflokkurin.fo
- Á forsíðuni kanst tú klikkja beinleiðis á:
- “Álit um brúkarapolitikk og brúkarastovn”.
- Innihaldsyvirlitið er á s. 2 í álitinum.
- Har kanst tú klikkja beinleiðis á teir ymisku partarnar av álitinum.

Hevur tú ikki atgongd til teldu við interneti, so kanst tú ringja til skrivstovuna hjá Javnaðarflokkinum á Gamla Apoteki í Havn, tlf. 312493, og sig frá, at tú fegin vilt hava Brúkaraálitið sendandi. So fært tú tað.

Álitið um Brúkarapolitikk og Brúkarastovn er skipað í fleiri kapitlar, og eru teir hesir:

- **Samandráttur:** Her verður greitt frá, hvussu brúkaramál best kunnu røkjast, og hvussu skipanin er ætlað at vera.
- **Grundgevingin** fyri brúkarapolitikki og brúkarastovni: Her verður gjølla grundgivið fyri, hví hesi brúkarapolitisku tiltøk eru neyðug og samfelagsgagnlig í einum nútímans brúkarasamfelag við marknaðarstýring.
- **Verandi lógargrundarlag:** Her verður greitt frá, hvat hendi tá Kappingarlógin kom í 1997 og lógin um Príseftirlit samstundis varð sett úr gildi.
- **Frágreiðing um lógaruppskotini:** Her verða lýst uppskotini til lóg um Marknaðarføring, Brúkarakærunevnd, Brúkaraumboð og bygnaðurin á ætlaða brúkarastovninum. Samstundis verður greitt frá hvussu hesi viðurskifti eru skipað í hinum norðanlondunum.
- **Um Brúkarafelagið:** Her verður í stuttum sagt frá Brúkarafelagnum, sum varð stovnað í 1974 og tikið av aftur í 1992.
- **Sjálvi lógaruppskotini** um Marknaðarføring og Brúkarakærunevnd: Her er sjálvur lógarteksturin, við viðmerkingum til einstøku greinarnar.
- **Svar frá hoyringum:** Álitið og lógaruppskotini vóru send nógvum til ummælis og her verður greitt frá innkomnu svarunum.
- **Tilmæli frá íslendska brúkarasamtakinum:** Av tí at tey, sum ikki vilja taka undir við okkara uppskoti, vísa til at vit heldur átti at brúkt tað “íslendska modellið”, hava vit biðið um og prentað her eina frágreiðing frá stjóranum fyri íslendska brúkararáðnum. Hann mælir harðliga frá at brúka “íslendska modellið”!

Hevur tú atgongd til teldu við interneti, kanst tú eisini hoyra orðaskiftið undir 1. viðgerð av lógaruppskotinum, við at fara inn á heimasíðuna hjá løgtinginum: www.logting.fo . Her skalt tú velja Tingmál, síðani Vanlig tingmál, síðani Nr. 45 ella 46, og so klikkja á “orðaskifti”. So kanst tú hoyra hvat umboðini fyri teir ymisku flokkarnar søgdu.

# Kjakið í SvF, har eg av góðum grundum ikki fekk svarað álopum frá Høgna Hoydal



**Jóannes Eidesgaard**

Kjaksendingin ónskvøldið í SvF var á mangan hátt sera áhugaverd - mest tí, at sjálvt evnið var áhugavert. Hvar gongur markið fyri vanliga embætisførslu, hvar gongur markið fyri neutralitetinum hjá embætismanninum mótvegis politikkaranum, og hvar gongur markið fyri loyalitatinum mótvegis politikkaranum?

Sum ikki einaferð, so var knappliga Jóannes Eidesgaard eina løtu tann mest áhugaverdi í sendingini, hóast eg als ikki var til staðar. Og orsøkin skuldi vera at finna í eini samrøðu við Dimmalætting um sama evnið.

Við Dimmalætting legði eg út við at siga, at tað er ein vanlig regla í politikki, at ein ikki gevur embætisfólkunum skyldina, um okkurt miseydnast politiskt. Men síðan segði eg víðari, at fakliga ráðgevingin í samband við fullveldissamráðingarnar ikki altíð var fakliga kvalifiserað, og tað haldi eg framvegis. Eg setti síðan spurningin, um tað skyldaðist politiskari yvirtrumfing, ella at embætisfólkini lótu seg ríva við av einum politskum stemningi.

At fara til Danmarkar við einum lidnum sáttmála, sum bert undirskriftirnar írestaðu á, má sigast at hava verið ótrúliga naivt og óbúgvið. Ein dugnaligur og royndur embætismaður hevði sjálvandi sagt við politikkararnar, at nú mugu vit fyrst á embætismannastigi lodda dýpið, áðrenn vit totalt lata okkum úr fyri mótpartinum, sum man so staðiliga endaði við at gera. Somuleiðis hevði eisini tann royndi politikkarin sagt, at vit taka fyrst eitt óformelt politiskt umfar fyri at finna útav, hvussu mótparturin fer at reagera. Men hvørki av hesum varð gjørt, og úrslitið var hareftir. Tískil er søgan om "de høje kontraherende parter", sum var orðaljóðið í næstan hvørjari grein í sáttmálauppskotinum framvegis ein "joke".

Tá vit í nevndararbeiði bæði í uttanlandsnevndini og í grundlógarnevdnini sóu skjøl, sum embætismenn høvdu skrivað, og sum beinleiðis høvdu politiskar argumentasjónir í staðin fyri fakligar, so er ikki heilt rætt vorðið. Hetta gjørdi seg galdandi bæði viðvíkjandi búskaparligum metingunum av einum skjótt minkandi ríkisstuðuli eins og við spurninginum um, at sjálvavgerðarrætturin kundi missast, um t.d. ein sjálvstýrislóg varð gjørd, hóast hetta so staðiliga er aftirvíst, seinast av Anders Fogh.

Hvør minnist ikki tá framstandandi embætismaður í sjálvstýrisumsitingini hjá Høgna Hoydal "live" av Christiansborg fór í fjømiðlarnar sum umboð fyri samráðingarnevndina og legði seg út í eina ótrúliga politiska litaða og niðurgerandi útlegging av nøkrum donskum úttalilsum. Er tað ein politiskt óheftur embætismaður?

Ella hvat tá sami embætismaður fer út í fjølmiðlarnar og skírir eitt uppskot, sum Javnaðarflokkurin hevur gjørt viðvíkjandi sjálvstýrislógini, fyri fupp og svindul. Er tað ein óheftur embætismaður?

Og so hevði Høgni Hoydal aftur peikifingurin uppi og ávaraði ímóti nakrari herferð ímóti embætisfólkum. Eg eri ikki ósamdur í tí, og tað er júst tað, sum eg gevi til kennar í samrøðuni við Dimmalætting.

Men hví livdi Høgni Hoydal ikki upp til hetta, tá hann alment fór út og hongdi navngivnan búskaparfrøðing út fyri at vera pengagrískan, tí hann ikki vildi missionera ókeypis um Hvítubók kring landið. Ja, so hørð var herferðin, at hesin annars sera dugnaligi búskaparfrøðingurin fór í annað arbeiði uttanlands.

# Á ránsveiði?

**Erhard Jacobsen**



Einaferð varð flent eftir Sjálvstýrisflokkinum, tí at hann vildi ganga fram stig-fyri-stig, tá ið politikkur skuldi førast. Um somu tíð, sum flent varð, var til ein flokkur, sum í navni sínum hevði undirheitið "radikalt sjálvstýri". Onkuntíð varð eisini flent eftir hesum og spurt, hvussu radikalt sjálvstýrið hjá hesum flokki mundi vera. Og svarið hava vit nú.

Jú, í Dagblaðnum nú um vikuskiftið sigur ein av tingmonnum Fólkaflokksins, Jóanis Nielsen í Sandavági, at nú hevur eisini Fólkaflokkurin valt sær politisku stevnuna at ganga stig-fyri-stig.Sambært Dagblaðnum sigur hann orðarætt: "Vit arbeiða fram ímóti sjálvstýri eftir sama leisti, sum altíð: Stig fyri stig. Vit yvirtaka so hvørt sum ráðini eru til tað." So vita vit tað!

Sjálvstýrisflokkurin kundi saktans havt sum undirheiti orðini "pragmatiskt sjálvstýri". Men hvat merkir so hetta orðið pragmatisma?

Umframt at vera eitt hugtak í heimsspekini, so merkir pragmatisma í politiskum høpi ein politikkur, sum ikki er bygdur á dogmatismu (stívar lærusetningar), men á tað, sum er praktiskt gjørligt og neyðugt. Pragmatisma er eisini merkt av, at tú hevur ein evolutioneran framferðarhátt eitt nú í politikki, ella at tú tekur teg fram stig-fyri-stig, heldur enn at ganga við einum dreymi um at gera kollvelting og loysa allar trupulleikar í eini handavending. Tí er pragmatisman kanska ikki so háfloygd í orðum, sum proklamatiónirnar hjá teimum politisku flokkunum, sum dáma best tað taktiska spælið, men ongin skal vera í iva um, at avrikini hjá teimum politisku flokkum, sum hella til pragmatismuna, roynast best í longdini.

At tað hevur týdning at hava bæði beinini niðri á jørðini hava vit fingið dømi um. Vit síggja júst í hesum døgum, hvussu ein av loysingaflokkunum er vorðin fangaður í sínum egna taktiska spæli. Bara tað at ein danskur statsministari smílist, men sigur júst tað sama sum ein múlatrútin fyrrverandi danskur statsministari, ger, at hesin loysingaflokkurin nú er í sjeynda himli og tosar um sjeymílafet. Jú, soleiðis broytist alt!

Men Fólkaflokkurin átti nú at kent seg ov góðan at fara á ránsveiði eftir politiskari stevnu, tí stig-fyri-stig er júst politiska stevnan hjá Sjálvstýrisflokkinum - um onkur skuldi havt gloymt tað.

# Umbering

**A. Guttormur Djurhuus**



Í viðmerking í Sosialinum hin 24. januar ger vinmaðurin Jan Müller, blaðstjóri, meg varugan við, at dulnevndar greinir ikki hava staðið í blaðnum síðan tann støða varð tikin, at tær skuldu bannlýsast. Heldur ikki nakað dulnevnt lesarabræv viðvíkjandi stríðnum á Landssjúkrahúsinum.

Rætt skal vera rætt. Eg havi blaðað tveir mánaðir aftur í Sosialinum og havi einki dulnevnt lesarabræv funnið og biði tí um treytaleysa umbering fyri skuldsetingina í viðmerking til stríðið á Landssjúkrahúsinum, um at blaðið skal hava hýst slíkum brøvum fyri at birta uppundir stríðið.

Tað eru tó fleiri við mær, sum halda at fjølmiðlarnir eru við til at birta uppundir stríð í samfelagnum. Av hvørji orsøk veit eg ikki. Til tað eru nógvar aðrar gongdar leiðir enn dulnevnd lesarabrøv. Annars haldi eg, enn sum áður, at skilagóðar dulnevndar greinir, eiga at fáa innivist. Hví havi eg grundgivið fyri fleiri ferðir, og er tí ongin orsøk til at endurtaka tær her.

Bert spell at eg skuldi misminna meg um, hvar eg hevði lisið dulnevna brævið, og gera Sosialinum órætt. Errare humanum est, ignoscerum divinum.